
*Magni Poulsen undirhelt á kvøldsetuni á Skála*


*Hilmar Kass greiddi frá, hvussu tað var at sigla undir seinna heimsbardaga*

# Hugnalig kvøldseta á Skála

**Sunnukvøldið var kvøldseta í skúlanum á Skála. Kvøldsetan hevur verið afturvendandi tiltak á Skálastevnuni tey síðstu árini**

SKÁLASTEVNA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sunnukvøldið klokkan 20 var kvøldseta í skúlanum á Skála. Hetta var endin á einari heldur miseydnaðari bygdastevnu á Skála. Veðrið var sera vánaligt í vikuskiftinum, og tað ávirkaði bygdastevnuna sera nógv. Fleiri tiltøk vórðu avlýst, millum annað kappróðurin og formuladysturin sunnudagin.

Emil Jacobsen skipaði fyri kvøldsetuni. Hon byrjaði við, at Oluf Djurhuus kom at greiða frá sínum barna- og ungdómsárum. Hann vísti millum annað á, at hóast summi foreldur siga við børn síni, at tey skikkaðu sær nógv betri, tá ið tey vóru børn, so vóru børn ikki petti frægari tá. Tey vóru líka illavorðin at skulka og gera fortreð, heldur Oluf.

Brøðurnir Poul Esper og Búgvi Jacobsen sungu nakrar sangir. Teir spældu báðir gittara og sungu kendar sangir og onkran, sum teir sjálvir hava gjørt.

Magni Poulsen var næstur á pallinum. Hann skuldi undirhalda við sínum „one-man show". Láturin rungaði, tá ið hann hermdi eftir gøtumonnum, mikladalsmonnum, Jónsvein Bech og øðrum.

Eftir ein lítlan steðg, har kaffi og køkur vóru at fáa, fór Hilmar Kass at greiða frá sigling undir seinna heimsbardaga. Hilmar dugdi væl at greiða frá, og áhoyrarnir lurtaðu áhugaðir. Hilmar greiddi millum annað frá, at hann hevði skotið eftir einum flogfari, sum fleyg lágt yvir bátin, men hann rakti ikki. - Eg eri glaður fyri, at eg ikki rakti, tí at flogfarið kom ikki aftur. Vit vistu heldur ikki, um tað var ein týskari ella onglendingur, tí at tað sást ikki munur á flogførunum, segði Hilmar Kass.

Til seinast sungu tveir ungir menn úr Meinigheitshúsinum á Skála nakrar sangir úr Missiónssangbókini, áðrenn áhoyrarnir aftur fóru hvør til sítt.



Høgni Hoydal um Sandoyartunnilin:

## Vit hava ikki ráð at lata vera

Í Útvarpinum sunnudagin segði Svein Christiansen, stjóri í NCC, at tunnilin til Sandoynna fer helst at kosta eitt stað ímillum eina hálva og heila milliard. Hóast tað heldur Høgni Hoydal, at vit eiga fara undir ætlanina beinanvegin: – Ongin ivi er um, at hetta er ein stór íløga, men eg haldi, at spurningurin er ikki, um vit hava ráð til eina íløgu av hesum slagnum, men heldur er spurningurin, um vit hava ráð at lata vera, heldur Høgni Hoydal.

Tað var, tá í tjóðveldisflokkurin í samgongu, at ætlaninar um undirsjóvartunlarnar vóru gjørdar, og tá var tunnilin til Sandoynna tann triðji í røðini. Nú er tað so vorðið so mikið ítøkiligt, at kunnandi fundur hevur verið og ein nevnd verður sett at arbeiða við fyrireikingunum.

Við tunlinum verður Sandoyggin ein partur miðstaðarøkinum, og miðpunktið verður flutt. Sambært Svein Christiansen verður koyrandi til Sandoynna um fimm og eitt hálvt ár, og tá so verður, sær Høgni Hoydal sær Sandoynna sum eina oyggj við eini bjartari framtíð og stórum potentiali.

**RWD**

# Nógv fólk til møtir við Trev Gregory

**Í vikuskiftinum var møtirøð við Trev Gregory í Meinigheitshúsinum í Havn. Leygardagin hevði hann eitt bønarskeið**

HEIMAMISSIÓNIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Ungdómsnevndin í Meinigheitshúsinum í Havn skipaði í vikuskiftinum fyri møtirøð við Trev Gregory. Hann hevur verið fleiri ferðir í Føroyum og talað fyrr. Millum annað var hann og talaði til ta nógv umrøddu mansleguna í fjørheyst. Trev arbeiðir fulla tíð sum ráðgevi hjá ymiskum kristnum felagsskapum, og so ferðast hann víða um sum talari. Føroyingar komu at kenna hann á einari stórari kristiligari ráðstevnu kallað „Missionkongres". Heimamissiónin sendi eitt ferðalag við nógvum ungfólki til ráðstevnuna.

Reimund Langaard hevur fingið Trev Gregory upp til Føroyar tær ferðirnar, hann hevur verið her. Reimund sigur, at hetta er fimtu ferð, at Trev Gregory er í Føroyum, og honum dámar sera væl í Føroyum. Spurdur, hví Trev verður biðin aftur og aftur at koma til Føroyar, sigur Reimund, at hann hevur framúr eginleikar at tala.

– Trev dugir á ein serligan hátt at gera tað áhugavert at lurta eftir sær, um hann so talar í 1-2 tímar. Hann nýtir kropsmál, skemtiligar søgur og upplivingar úr sínum egna lívið til at bera fram boðskapin um Jesus. Honum dámar væl í Føroyum, og okkum dámar væl at hava hann ímillum okkum, og at hoyra hann tala, sigur Reimund Langaard.

Undirtøkan fyri møtirøðini var sera góð. Millum 130 og 200 fólk vóru til møtini um kvøldið, og 70 fólk vóru til bønarskeiðið. Trev segði, at hann hevur ongantíð upplivað so nógv luttakandi til eitt tílíkt skeið.


*Trev Gregory fyrireikar seg til møtið*

*mynd: www.mission.fo*